Tormó›ur Djurhuus, advokatur og nú eisini deildarlei›ari hjá Enterprise Oil í Føroyum.

Mynd: Jens K.Vang

Enterprise Oil deild í Føroyum

Føroyskur advokatur deildarlei›ari hjá oljufelag

Oljuleiting
Jan Müller

Nú mong útlendsk oljufeløg eru vi› at fáa fótin fastan í Føroyum eru eisini bo› eftir føroyingum. Eitt nú til at standa fyri n‡ggju føroysku deildunum hjá feløgunum. Nú um dagarnar tók Tormó›ur Djurhuus, advokatur hjá Advokatfelagnum vi› Strond vi› sum deildarlei›ari hjá Enterprise Oil Exploration Limited - Faroe Branch.

Enterprise Oil fekk saman vi› Statoil sum fyristø›ufelag (operatøri), Veba Oil og Philips Petroleum tilluta› part í tveimum loyvum á føroyska landgrunninum í august. Enterprise Oil hevur ein prosentpart uppá 20 í loyvi nr. 003, i› er eitt seks ára loyvi, og ein prosentpart uppá 15 í loyvi nr. 006, sum er eitt níggju ára loyvi saman vi› Anadarko. Loyvini talan er um fevna um 13 teigar og parteigar og koma royndirnar hjá Enterprise frá virksemi á Atlantsmótinum at ver›a t‡dningarmiklar fyri leiting á hesum n‡ggja og spennandi øki sigur Enterprise Oil í tí›indaskrivi, nú ta› hevur lati› upp deild í Havn.

Enterprise Oil er skrásett í Bretlandi vi› áhugamálum í trimum høvu›søkjum (Bretlandi og Írlandi, Noregi og Danmark, og Italia) og tveimum hjáøkjum (Meksikanska flógvanum og Brasilia. Felagi› framlei›ir fyri tí›ina 270.000 tunnur av oljuúrdrátti um dagin og hevur goymslur uppá meira enn 1,2 milliard tunnur.

Enterprise Oil fegnast um at hava fingi› møguleika fyri at arbei›a í Føroyum og ver›ur adressan hjá felagnum hereftir Advokatfelagi› vi› Strond 4, Yviri vi› Strond 4 í Havn.

Tormó›ur Djurhuus, deildarlei›ari hjá felagnum sigur, at teir hava nógvar uppgávur fyri útlendskar kundar og er ta› bara heilt náttúrligt, at teir eisini átaka sær eina slíka uppgávu sum hesa. Hann hevur annars fylgt væl vi› gongdini á oljuøkinum øll hesi seinastu árini og hevur javnan havt tætt samskifti vi› oljufeløg í útlandinum. Ta› kemur tí eisini væl vi› nú sum ballast í starvinum sum deildarlei›ari hjá Enterprise Oil, sum í oljuheiminum ver›ur mett at vera eitt av teimum smærri oljufeløgunum, i› hevur havt eydnuna vi› sær og hevur duga› at fingi› nógv burtur úr.

Frammanundan hevur italska oljufelagi› Agip eisini havt adressu hjá Advokatfelagnum, har Ingi Højgaard, advokatur hevur røkt uppgávuna sum filiallei›ari. Nú letur Agip so upp egin høli í høvu›ssta›num.

Krevur eykajáttan til Akravegin

Vegurin millum Lopra og Akrar er í ógvuliga vánaligum standi. Hendrik Old vil hava løgtingi› at samtykkja eina eykajátta, so vegurin kann gerast sum skjótast

Eykajáttanaruppskot
John Johannessen

Vegastrekki› millum Lopra og Akrar í Su›uroynni er í so vánaligum standi, at bussarnir hjá Bygdalei›um, bilarnir hjá IRF og oljubilar s‡ta fyri at koyra eftir tí.

Hetta heldur Hendrik Old úr Javna›arflokkinum ikki sømir seg í einum framkomnum samfelag, og tí hevur hann lati› løgtingsskrivstovuni eitt uppskot um eykajáttan á 300 túsund krónur at leggja fyri tingi› fríggjadagin, so vegurin kann gerast sum skjótast.

– Arbei›i› á Núpinum millum Vág og Lopra er júst li›ugt, og tí skuldi bori› væl til at flutt fólk og útger› hagani til vegin millum Lopra og Akrar, vísir Hendrik Old á.

Tingma›urin, sum er valdur fyri Javna›arflokkin í Su›uroynni vónar, at landsst‡risma›urin í samfer›slumálum kann finna eina loysn, so vegurin kann gerast sum skjótast. Ber hetta ikki til, heldur hann ta› ver›a ney›ugt, at eykajáttanaruppskoti› ver›ur samtykt.

– Ta› ber ikki til, at fólk skulu liva undir so vánaligum umstø›um, sigur Hendrik Old.

Hendrik Old vísir á, at skúlin á Leiti, sum er bygdaskúli fyri Lopra og Akrar liggur mitt á nevnda vegastrekki, og tí eru um 20 skúlabørn í aldrinum 7 til 12 ár noydd at fer›ast eftir hesum vegastrekki dagliga.

– Vegurin er vor›in so smalur eftir at SEV hevur grivi› ka›al ígjøgnum hann, at skúlabørnini eru noydd at leypa av vegnum, tá ein bilur kemur, og hetta kann ikki gó›takast, sigur Hendrik Old.

Játtanin til Landsverkfrø›ingin á fíggjarlógini í ár er um at vera brúkt og á fíggjarlógaruppskotinum til næsta ár eru bert 1,2 milliónir settar av til vi›líkahald av vegunum í Su›uroynni. Hetta heldur Hendrik Old vera lægstu játtan í n‡ggjari tí›.

Vegurin til skúlan hjá børnunum í Lopra og á Økrum er vor›in so smalur, at børnini eru noydd at leypa av vegnum, um ein bilur kemur

Mynd: Edvard Joensen

Bygdará›sforma›uri í Sumbiar Kommunu, Jacob Vestergaard, hevur eisini gjørt vart vi› seg í sambandi vi› vegin millum Lopra og Akrar. Jacob Vestergaard hevur sent Bjarna Djurholm, landsst‡rismanni, bræv, har hann heitir á landsst‡rismannin um at fáa gjørt naka› vi› vegin sum skjótast.

Broyttu regluger›ina til egnan fyrimun

Tríggir av flokkunum í Tórshavnar B‡rá› samtyktu t‡skvøldi› at loyva politiskum l‡singum á b‡arbussunum til frama fyri sítt egna valstrí›

Valstrí›
John Johannessen

T‡sdagin kalla›i b‡rá›sforma›urin í Havn til eykab‡rá›sfund vi› einum máli á skránni. Gerast skuldi av, um verandi regluger› fyri Busslei›ina skuldi broytast, so politiskar l‡singar í sambandi› vi› b‡rá›svali› kundu loyvast á b‡arbussunum.

Orsøkin til fundin var, at tríggir flokkar í b‡rá›num, nevniliga Sambandsflokkurin, Tjó›veldisflokkurin og Fólkaflokkurin, høvdu gjørt avtalu vi› eina l‡singastovu um at gera l‡singar til valstí›i› at seta á bussarnar, og nú l‡singarnar vóru lidnar og skuldu setast á bussarnar var› funni› út av, at hetta sambært regluger›ini ikki var loyvt.

T‡dningarmiki› mál

Á heimasí›uni hjá Tórshavnar B‡rá› stendur at lesa, at b‡rá›i› heldur eykafundir, tá stø›a skal takast til t‡dningarmikil mál, sum hava skund.

Eitt slíkt mál metti Leivur Hansen, b‡rá›sforma›ur, máli› um l‡singarnar á bussunum vera, og gjørdi hann tí av at kalla til eykab‡rá›sfund t‡sdagin vi› stuttari freist.

– Hetta var eitt t‡dningarmiki› mál, tí ta› snúi seg um politiskar l‡singar á›renn b‡rá›svali›, sum er um ikki so langa tí›. L‡singastovurnar høvdu longu gjørt avtalur vi› busseigarar, og tá busseigarar heittu á b‡rá›i› um at fáa regluger›ina broytta, helt eg ta› sjálvsagt vera umrá›andi, sigur Leivur Hansen.

B‡rá›sforma›urin heldur, at broytingin er ein liberalisering, i› var ney›ug fyri busseigararnar.

Skunda› ígjøgnum

Máli› um politiskar l‡singar á b‡arbussunum í Havn tók seg upp, tá tekniska nevnd hjá b‡rá›num hev›i fund hósdagin 2. november.

Á hesum fundinum kom máli› eins og á b‡rá›sfundinum fram sum eitt eykamál, i› ikki stó› á vanligu dagsskránni.

Tá fundurin í teknisku nevnd var› settur, bo›a›i Klæmint Olsen, forma›ur, frá, at hann hev›i eitt eyka mál liggjandi, sum ikki stó› á dagsskránni. Tá eingin b‡rá›slimur mótmælti hesum, var› gjørt av at vi›gera ta› á fundinum.

Endin av vi›ger›ini í teknisku nevnd var›, at ein meiriluti mælti til at samtykkja at broyta regluger›ina, me›an minnilutin kravdi máli› fyri b‡rá›i›.

Tí sendi b‡rá›sforma›urin út fundarbo› seinnapartin t‡sdagin um, at b‡rá›sfundur skuldi ver›a t‡skvøldi›.

Mótmæltu

Á b‡rá›sfundinum mótmæltu b‡rá›slimir úr hinum flokkunum, at hetta máli› um politiskar l‡singar á b‡arbussunum yvirhøvur var› vi›gjørt beint á›renn b‡rá›svali›.

Men hesar grundgevingar vunnu ikki frama. Í sta›in samtykti› b‡rá›i› at strika or›ingina í grein 17 í sáttmálanum hjá Busslei›ini, i› sigur, at ta› ikki er loyvt at hava politiskar l‡singar á ella í bussunum.

Torfinn Smith, b‡rá›slimir finnist í vi›merking í blø›unum í dag har›liga at avger›ini hjá b‡rá›num. Ein av ni›urstø›um hansara er, at b‡rá›ssamtyktir bert eru galdandi til tær eru til ampa fyri b‡rá›slimir.

Solei›is sá grein 17 í regluger›ini fyri sáttmálan vi› Busslei›ina út til í gjár. Nú er seinasti setningurin strika›ur

§ 17

L‡singar kunnu vera inni í og uttan á bussunum. Sáttmálagevarin hevur rætt til ókeypis ar n‡ta 1/4 av l‡singarplássinum inni og velur sjálvur, hvørji pláss ver›a n‡tt. Vi› dags varningi skulu l‡singar innan takast vi›. Arbei›stakarin hevur annars allar inntøkur av l‡singunum innan og uttan á bussinum.

L‡singarnar skulu vera eftir internationala reklamukodeksinum.

Arbei›stakarin hevur alla ábyrgd yvir fyri lóggávu av l‡singum frá ø›rum enn sáttmálagevaranum. Sáttmálagevarin kann nokta l‡singum, sum leggja upp til kapping vi› Busslei›ina.

Ongar politiskar l‡singar mugu vera á ella í bussunum

§